FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 20. oktober 2020
J. nr.: 20/00467-2
Viðgjørt: DH

Svar upp á fyrispurning nr. 27/2020 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Jaspur Langgaard, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um endurrindan av tunnilsgjaldi til pendlarar.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu hevur gongdin verið fyri árlig útgjald av ferðastuðli fyri koyring gjøgnum ávikavist Norðoyatunnilin og Vágatunnilin seinastu 10 árini?
2. Kunnu t.d. 4 fólk koyra saman og øll hvør sær fáa endurrindað tunnilsgjald frá Taks sum ferðastuðul?
3. Er skipanin við endurrindan eisini galdandi fyri tey, sum brúka buss?

Svar til spurning 1
Ynski okkara í Føroyum er, at fólk skulu kunnu búgva kring landið og skattaborgarar skulu tí ikki revsast fyri at ferðast til arbeiðis. Hetta merkir, at fólk, sum hava langt til arbeiðis skulu javnsettast við tey, sum hava stutt til arbeiðis. Tí letur landið ferðastuðul til skattaborgarar sum hava longri enn 20 km millum heim og arbeiðsstað og hava útreiðslur til hesa ferðing. Serstakur stuðul verður veittur til ferðing gjøgnum undirsjóvartunnil, við ferjum og tey, sum ferðast loftvegis. Ferðastuðul fyri koyring gjøgnum undirsjóvartunlar er 8,45 kr. hvønn vegin.

Skrásetingarnar hjá TAKS eru soleiðis, at tað ber ikki til at skilja útgoldna ferðastudningin sundur, so at man sær júst hvat er goldið fyri koyring gjøgnum Vága- og Norðaroyartunnilin. Tí hevur Fíggjarmálaráðið brúkt talgildu umsóknirnar sum grundarlag fyri at gera eina meting. Metingin er, at árligi ferðastuðulin til koyring gjøgnum báðar undirsjóvartunlarnar hevur ligið millum 3 og 4 mió. krónur fyri tey seinast árini.
Í talvuni niðanfyri síggjast samlaðu útreiðslurnar til ferðastuðul síðani 2010.

Útreiðslur til ferðastuðul 2010-2019 (1000 krónur)

2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019
15.745	15.065	14.439	17.022	16.179	15.879	18.592	20.856	22.149	22.825

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Svar til spurning 2 og 3
Tað er ikki avgerandi fyri ferðastuðulin, hvussu tú ferðast, heldur ikki um tú ferðast í bussi. Treytin er tó, at tú hevur útreiðslur til ferðing millum bústað og arbeiðsstað.

So hvørt prísirnir í undirsjóvartunlunum eru falnir er ferðastuðulin eftirmettur. Seinast stuðulin til ferðing gjøgnum undirsjóvartunlar var broyttur var í 2008, tá stuðulin til ferðing gjøgnum undirsjóvartunnil lækkaði úr 10 kr. til 8,45 kr.

Tinganes, 20. oktober 2020

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum